# STARV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingur til Økispsykiatriina í Norðurstreymoy

Vegna barnsburðarfarloyvi er eitt starv sum avloysari fyri sjúkrarøktarfrøðing í økispsykiatriska toyminum á Psykiatriska deplinum við tænastu í Norðurstreymoy leyst at søkja. Talan er um 32 tímar um vikuna frá 15. apríl 2009 til og við 31. januar 2010.

Í økispsykiatriska toyminum eru í løtuni seks sjúkrarøktarfrøðingar, sum arbeiða út frá viðtalum í Runavík, Tórshavn og Hvalvík í tøttum samstarvi við onnur toymir á Psykiatriska deplinum.

Arbeitt verður alsamt við at menna og útbyggja økispsykiatriina, sum ætlandi skal fevna um alt landið. Arbeitt verður við útgangsstøði í svenskari fyrimynd fyri samskipaðari psykiatri og gera neyðugar tillagingar til føroysk viðurskifti.

**Tær økispsykiatrisku uppgávurnar er:**
- at vera uppsøkjandi í mun til brúkarar við sinnistrupulleikum, bæði í mun til tey, sum hava verið innløgd og tey, sum ongantíð hava verið í samband við psykiatriina
- stuðla brúkaranum í mun til at skilja egnu sinnistrupulleikar
- samstarva við avvarðandi og onnur, ið eru um menniskja við sálarligum órógvi
- í samráð við brúkaran at tilrættisleggja og skipa dagligdagin soleiðis, at so vítt gjørligt afturstig kunnu umgangast
- at samskipa røkt og viðgerð

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og mennandi arbeiðsumhvørvi
- stórt frælsi í mun til at tilrættaleggja arbeiði
- upplæring og innleiðsla til metoduna áðrenn tú sjálv/ur skal til arbeiðis

**Vit vænta av tær:**
- útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góðar samstarvsførleikar, tá vit arbeiða í toymisskipan
- jaligan hugburð
- arbeiðsroyndir innan psykiatri

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðandi sjúkrarøktarfrøðing Bergit Weihe, tlf. 304500, lokal 4102 ella til leiðaran av Daglonunum, Súsannu Olsen, lokal 4170.

**Umsóknarfreistin er 9. mars 2009 kl. 12.00**

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum
(sí meira á www.lsh.fo)

**Sjúkrarøktarfrøðingur til G1**
Umsóknarfreistin er 23. februar 2009 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til B7**
Umsóknarfreistin er 23. februar 2009 kl. 12.00

**Læknaskrivari til Psyk. depilin**
Umsóknarfreistin er 27. februar 2009 kl. 12.00

**Summarfrítíðaravloysarar**
Umsóknarfreistin er 5. mars 2009

**Ljósmóðir til Ljósmøðratænastuna**
Umsóknarfreistin er 24. mars 2009

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn
ella við telduposti til umsokn@ls.fo



**Á Landssjúkrahúsinum**
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

# Nýtt teoriskeið

**Teoriundirvísing til lastbil, trailara og buss byrjar mikudagin 4. mars kl. 18.00**




TEL 57 39 40 · JH505@KALLNET.FO

# ókeypis.fo

***...fá meira fyri einki!***

Fær inn á ókeypis.fo og svara nøkrum spurningum og verð við í lutakastinum um góðu vinningarnar!

MASKINMEISTARAFELAGIÐ

# Aðalfundur

Maskinmeistarafelagið hevur ársaðalfund

**leygardagin 7. mars kl. 14**

á Hotel Hafnia

**Skrá**
1. Val av fundarstjóra.
2. Frágreiðing formansins.
3. Leggja fram roknskap til góðkenningar.
4. Uppskot um lógarbroytingar.
5. Val av formanni, nevndarlimum og tiltakslimum.
6. Ásetan av limagjøldum.
7. Velja skrásettan grannskoðara.
8. Ymiskt.

**Uppstillaðir til formansvalið eru:**
- Páll Hansen og
- Jógvan Nybo

Rokniskapur og uppskot til lógarbroytingar kunnu síggjast á skrivstovu felagsins 14 dagar áðrenn aðalfundin.

Aftaná fundin verður ábit.

**Nevndin**

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# Selja bilin?
– set hann í Sosialin!

**Ring og fá ein prís!**



Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.

Tú kanst lýsa við og uttan mynd.

Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

Sosialurin
– blaðið øll lesa!

Sosialurin
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
post@sosialurin.fo